## Facebook bólkur fyri KÍ

KÍ-fjepparar hava nú stovnað ein bólk á Facebook, har endamálið er at savna pening inn, nú KÍ skal gjalda fyrrverandi venjaranum, Tony Paris, beint oman fyri hálva millión. Í lýsingini av bólkinum verður sagt, at fleiri stórir stuðlar longu hava verið inni í myndini, og at fleiri privat-fólk hava spurt, hvussu tey á besta hátt kunnu stuðla felagnum, áðrenn rokningin skal gjaldast. Og tað skal hon fríggjadagin klokkan 12.



## Lava fer eisini til Frem

Danska Frem hevur boðað frá, at tveir føroyskir landsliðsspælarar nú eru í hópinum hjá felagnum. Fyrr í vetur gjørdi felagið avtalu við Boga Løkin, og nú er greitt, at Andreas Lava Olsen eisini verður partur av hópinum hjá Frem. Andreas hevur veruliga gjørt um seg, síðani GÍ og LÍF fyri tveimum árum síðani løgdu saman í Víking. Hetta gav leirvíkinginum møguleika at spæla í fremstu røð, og tað hevur hann gjørt somikið sannførandi, at hann eisini hevur verið partur av føroyska A-landsliðshópinum



Carlos Tevez kundi eftir øllum at døma ikki brúkast í Manchester United. Í gjár staðfesti hann, at hann hevur sína egnu meining um tann spurningin
Mynd: Polfoto/AP

# Tevez 2 – United 1

**Carlos Tevez var stóra hetjan tá Manchester City í gjár vann á grannunum úr Manchester United. Tevez, sum skifti frá United til City í summar, skoraði bæði málini í 2-1 sigrinum og fekk samstundis sent eina heilsan til gamla felagið hjá sær. Sosialurin var á City of Manchester Stadium til fyrru hálvfinaluna í Carling Cup**



argetrondur@ofir.dk
Tróndur Arge

Stutt fyri hálvleik bríkslar dómarin fyri brotssparki til Manchester City.

Hjá bóltinum stendur maðurin við 32 talinum hjá Man City. Omanfyri talið stendur við hvítum stavum – TEVEZ.

Fram til í summar umboðaði Tevez Man United, men skifti reyðu troyggjuna hjá teimum út við ljósabláðu troyggjuna hjá Man City. Tað fall ikki í góða jørð hjá Man Utd viðhaldsfólkinum, sum ikki hava fyrigivið honum fyri skiftið.

Nógv er skrivað og sagt síðani tá, men áðrenn dystin kundi liðskiparin hjá Man Utd, Gary Neville, ikki halda sær. Við enskar fjølmiðlar segði hann at Tevez ikki var verdur teir pengarnir, ið Man City høvdu goldið fyri hann.

Jú hetta var meir enn bara eitt vanligt brotsspark. Hetta var møguleikin hjá Tevez svara aftur uppá ákoyringarnar og visa sítt virði. Framman fyri endanum har sum Man Utd áskoðarnir sótu, legði Tevez bóltin til rættis. Hóast bæði Edwin van der Sar og Wayne Rooney royndu at ávirka fyrrverandi liðfelagin, so var Tevez tryggur úr 11. metrum. So stór hevur gleðin ikki verið á City of Manchester Stadium hetta kappingarárið, sum tá bólturin brast í netið handar Van der Sar.

Tevez sjálvur nýtti høvið til at senda eina heilsan til Man Utd áskoðarnir.

### Kill him!

Tað eru nógv trygdarfólk og løgreglumenn at síggjan rundan um stadium áðrenn dystin. Millum annað verður ein bólkur uppá uml 30 Man Utd áskoðarar umringaður av løgreglumonnum á stórum flottum hestum. Teir fáa boð um at bíða, meðan løgreglan saman við trygdarfólkum kropskannar teir.

Sum vanligt er tá City spælir um kvøldið, so verður ljósið sløkt á stadion eina løtu áðrenn spælararnir koma inn á vøllin.

Bara ein bláður máni sæst, meðan áskoðarnir syngja eyðkennislagið hjá Man City "Blue Moon".

Tað gevur ein góðan stemning og tað merkist eisini at hendan grannauppgerðin er okkurt serligt.

Dysturin er bara nakrar fáar minuttir gamal, tá Tevez fer tvísporandi eftir einum Man Utd verjuleikarara, ið gert klárt sparka vekk. Tað er vanlig í slíkum støðum, at áskoðarar stilla seg upp og rópa eitt nú "get in there" ella "tackle him". Men í gjár var ongin vanligur dystur. Í staðin fekk Tevez tey greiðu boðini frá síðumanninum, sum reisti seg upp við nevanum á lofti: "KILL HIM – Kill that f… twat!"

Hann meinti tað nokk ikki í álvara, men kenslurnar vóru til at fáa eyga á.

### Misti málið

Dysturin var eitt gott korter gamal, tá Ryan Giggs úr stuttari fjarstøðu kundi leggja gestirnar á odda. Tað eru 14 ár síðani at hann seinast skoraði móti Man City. Stadium frásøgumaðurin var so spakur á málinum, at tað ljóðaði sum um hann hevði gloymt navnið á Giggs.

Tað vóru væl fleiri Man Utd áskoðarar á City of Manchester Stadium enn tað er til ein vanligan Premier League dyst. Teir gingu eisini á odda eftir leiðslu málið og vunnið greitt dystin uttanfyri vøllin fram til útjavnandi málið hjá Tevez. Hesa ferð var stadium frásøgumaðurin ikki iva um hvør tað var, ið hevði skorað.

Lagið var gott í hálvleikinum. Nógv smíl vóru at síggja, meðan folk keyptu sær kaffi og annað gott. Stórir flatskermar vísu tað besta frá fyrra hálvleiki. Ikki minst var stórur áhugi fyri at vita, um brotssparkið var rætt dømt.

Seinni hálvleikur var hálvrunnin, tá Tevez úr stuttari fjarstøðu skallaði bóltin í málið til 2-1.

Hesa ferð fór hann rennandi allan vegin yvir til útskiftisbonkin hjá Man Utd. Her gav hann teimum boð um at teir bara kundu blíva við at tosa, tí hann hoyrdi teir so ikki. Kanska Tevez hoyrdi stadium frásøgumann, tí nú rópti hann dupult so hart, sum tá Tevez javnaði.

Eftir hetta legði Man Utd trýst á vertirnar, men hóast teir komu til onkrar møguleikar, eydnaðist tað ikki at fáa bóltin framvið Shay Given. Hann var saman við Tevez og Craig Bellamy teir mest eyðsýntu á heimaliðnum, meðan serliga Wayen Rooney gjørdi nógv um seg hjá gestinum. Um eina viku bresta liðini saman aftur í seinnu hálvfinaluni á Old Trafford – Sosialurin fylgir gongdini.

# Fótbólts-spælarar gingu amokk

**Steypadystur í Norðurírlandi mátti steðgast, tá ið spælarar og leiðarar stutt fyri leiklok brustu saman. Norðuríska fótbóltssambandið avlýsti aðrar dystir eftir tilburðin**

Tað gekk fullkomiliga galið, tá ið Newry og Larne spældu steypadyst í Norðurírlandi um vikuskiftið.

Tá ið átta minuttir vóru eftir at spæla, gingu spælarar á báðum liðum amokk. Tá vóru tveir spalarar hjá Larne, sum var aftanfyri 2-1, útvístir, og venjarin var eisini biðin um at fara av vøllinum. Og tað hevði við sær ein óvanligan samanbrest millum spælarar og leiðarar á og uttanfyri vøllin.

– Eg havi ongantíð upplivað nakað slíkt áður. Tað vóru bardagar um allan vøllin, og eg varð noyddur at steðga dystinum, sigur dómarin Raymond Crangle við Belfast Telegraph.

Eftir hendingin avlýsti Norðurírska fótbóltssambandið aðrar steypadystir, og nú verður roknað við hørðum revsingum til feløgini og spælarar, sum vóru við í roknum.

Norðurírska løgreglan hevur eisini boðað frá, at hon fer at kanna málið.

**ek**



Ikki sá tað vakurt út, tá spælararnir hjá norðurírsku liðunum, Newry og Larne, ruku saman at berjast, so dysturin mátti steðgast